







# Vælhildin og hugnalig sethús í Hvalsoyargøtu í Tórshavn

Húsini standa við ein blindveg í góða umhvørvinum í Hvalsoyargøtu í vesturbýnum í Tórshavn. Tá tú koyrir niðan eftir Grønlandsvegnum og snarar til vinstru inn í Hvalsoyargøtu, merkir tú alt fyri eitt, at hetta er eitt friðarligt og barnavinarligt umhvørvi. Her er gott at búgva bæði hjá ungum sum eldri familjum.

Talan er um eini sera vælhildin og hugnalig hús við romantiskum stíli. Her býr ein familja, sum leggur dent á trivna og hugna í heiminum.

Stutt er oman í býin til handlar. Nærhendis liggur Dagstovnurin í Øksnagerði, Dagstovnurin við Landavegin og Dagstovnurin við Velbastaðvegin. Somuleiðis er stutt til Venjingarskúlan, Læraraskúlan og eisini til Handilsskúlan og Tekniska skúla.

Fram við húsunum í erva eru flísar lagdar á túnið við høvuðsdyrnar og grótgarður er gjørdur fram við græsplenuni við fleiri sera vøkrum blómubedum.

Húsini eru í trimum hæddum. Í miðhæddini er ein gongd, tvey baðirúm, køkur, ein stór stova og trý kømur. Í báðum baðirúmunum er hiti í gólvinum. Køkurin er ljósur og arbeiðsvinarligur og her hevur tú gott pláss til ein spísikrók.

Stovan er sera stór og gevur nógv pláss bæði til fólkini, sum búgva í húsinum og til at hava nógvar gestir. Út frá stovuni er útgongd til eina frálíka altan, sum er so mikið stór, at tú hevur møguleika at hava havamøblar, grill, snórastativ o.a. úti. Her er góður sólargangur. Í midhæddini eru øll gólvini furugólv. Loft og veggir eru úr træi, eins og innhurðarnar eisini eru úr træi. Eisini er ventilatiónsskipan í miðhæddini.

Á loftinum er ein hugnaligt atmosfera. Her er ein hugnalig loftsstova og tvey stór og góð rúm við skrálofti. Her er nógv pláss til eina stóra familju við børnum í ymsum aldrum.

Í kjallaranum er eitt stórt bilhús og eitt sera rúmligt kjallararúm, sum kann nýtast til nógv ymiskt.

Tú fært meira at vita um ognina við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 1987 |
| Hæddir: | 3 |
| Stødd innan: | 300 fermetrar |
| Grundøkið: | 508 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.500.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**